


## Facebook-drápsmaður og tjúkkar gentur

Fyri einari viku síðani drap hann eina 17 ára gamla gentu, sum hann fekk samband við á Facebook. Nú eru fleiri ungar gentur, sum greiða frá, at tær eisini hava verið í samband við drápsmannin. Allar genturnar eru ovurfeitar, hava myrkt, langt hár og líkjast ógvuliga nógv hvørjari aðrari. Tað skrivar bretska blaðið The Sun í dag. Í blaðnum greiður ein av yndisgentunum hjá drápsmanninum frá, hvussu hann gekk aftaná henni. Catherine Carty hitti Peter Chapman á einari datingsíðu fyri hálvum øðrum ári síðani, og nú er hon ógvuliga skelkað av at vita, at hon í veruleikanum hevur hitt ein drápsmann. - Hann segði, at honum dámdi væl tjúkkar gentur. Hann sendi mær ónærislig boð á Facebook og MSN. Hann skrivaði altíð um sex. Eg visti, at okkurt var galið við honum, sigur Catherine Carty við The Sun. Hann varðveitti tó ikki sambandið við Catherine á netinum. Hon varnaðist, at hann ofta gekk uttanfyri hennara heim. Hon sá hann har meiri enn 100 ferðir. Lukkuligan fyri Catherine, so misti hann áhugan í henni. Umvegis Facebook hitti hann Ashleigh Hall, ið ikki gjørdist eins heppin. Hon endaði sítt 17 ára langa lív í einari veit. Á Facebook segði Chapman seg verða ein 17 ára gamal drongur. Peter Chapman er nú fonglsaðu og ákærdur fyri kidnapping og dráp.

# Slóðbrótari og eldsál



**- Vit eru higar komin at minnast Statshospilaðið, seinri Psyk.deild og nú Psykiatriska depilin fyrstu 40 árini og í tí sambandi heiðra minnið um Árna Olsen, yvirlækna, kveikjara av føroyskari psykiatri og undangongumann í mong ár og at avdúka bringumynd úr bronsu av honum, segði Eyðun Joensen á hátíðarløtu leygardagin**

HÁTÍÐARHALD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein teirra, ið hevur starvast longst saman við Árna Olsen, sála, er Eyðun Joensen, sálarfrøðingur. Og hann nýtti eisini høvið at bera fram eina kvøðu til Árna Olsen og Psykiatriska depilin á 40 ára degnum.

- Føroya land hevur gjøgnum tíðirnar fostrað undangongufólk,eldsálir, pionerar og legendir.

Á skúlaøkinum háskúlafólkini og innan vinnulívið mong.

Á heilsu- og almannaøkinum minnast vit slík undangongufólk sum t.d. Paula Dahl, legendariska skurðlæknan í eitt mannaminni, Vilhelm Magnussen, sum basti tuberklunum í Føroyum, Marner, kvinnulæknan, konubrot sum Nicolinu á Barnaheiminum, Karolinu Petersen á Alv og nú Árna Olsen, sum fyri meira enn 40 árum síðani vissuliga breyt upp úr nýggjum, ella rættari úr ongum, setti skjøtil á veruliga psykiatri her á landi og síðani bar førningin so væl víðari fram á vegin í eini 30 ár, segði Eyðun Joensen.

Hann nam við tað sermerkta í, at ein lítil bygd sum Kunoy við avmarkaðari skúlagongd, kundi fostra so mætar og vællisnar menn sum Árna Olsen, beiggjan Hildebrant og brøðurnar Bjarna og Danjal Niclasen. Hann nevndi eisini, at tað var pápi Árna, Jóhan Svend Olsen, sjum var lærari í bygdini.

### Tilboð til sjúklingarnar

- Sum kunnugt vóru undan 1969 so at siga eingir viðgerðarmøguleikar fyri sálarsjúkur í Føroyum, men sjúklingar eins og menningartarnað skjótast gjørligt send av landinum, nógv fyri well, og so kann hvør einstakur hugsa sær, hvussu tað hevur verið fyri sjúklingar, avvarandi og samfelagið alt, segði Eyðun Joensen.

Hann nevndi stóra heilsuframbrotið, sum hendi í Føroyum fyri 40 árum síðani, tá Statshospitalið var grundsett.

- Mann kann eftirsíðan og nú á døgum hava meiningar um tær umstøður , sum hava verið og framvegis verða bjóðaðar sálarsjúklingum, men spola vit tíðina 40 ár aftur, svitast ikki, at táverandi nýbygda Statshospitalið var millum mest framkomnu í Norðurlondum bæði viðvíkjandi hølum, tólum og starvsfólkum., segði Eyðun Joensen.

Eisini var nógv gjørt fyri sjúklingarnar. Fysio- og ergoterapi, sosialráðgeving, uttanduraítriv, gudstænasta, sjúklingaklubbur við bingo, advents- og jólahugni. Eisini sjúklingaveitslur og sjúklingaútferðir, bæði innanlands og uttanlands.

- Seinnu árini eru tó onkur av hesum sjúklingatiltøkum slept, síðani so mong av teimum eldru varandi sjúku eru deyð burturav, í meðan onnur góð frambrot eru komin í staðin fyri, til dømis undirvísing, musikkterapi, ymisk bólkaviðgerð, sosialpsykiatri umframt útflyting í meira heimlig sambýli úti um landið við teimum trivnaðarmøguleikum, sum tað ber í sær, segði Eyðun Joensen.

### Eyðmjúkur

Árni Olsen er mintur sum ein framúr kompetentur og virkin fakmaður, bæði í psykiatri og neurologi. Harumframt var hann ein sonn eldsál at virka fyri bata og dugna til mentalt sjúk fólk, veri tað ser sinnisliga veik eins væl sum til onnur andsevni.

- Uttan at taka frá nøkrum øðrum var hann í psykiatriini buktin og báðir endarnir og myndaði í almena rúminum deildina so mikið, at fólk yvirhøvur ímyndaðu føroyska psykiatri við sjálvan Árna Olsen, segði Eyðun Joensen.

»Úti hjá Árna« ella minni pent »Árnasavnið«, søðu fólk. Hann umboðaði føroyska psykiatri sera væl, bæði í almenna føroyska rúminum, í fjølmiðlum, á fundum eins og á ráðstevnum uttanlands.

- Hann segði tú við akademiskar javnlíkar, men hann segði tygum við onnur, ja, sjálvt sín egna skrivara øll árini, segði Eyðun Joensen.

Hann kundi tykjast bráur í sínum atgerðum og kanska úteftir tykjast nakað knortlutur í framferð, tó vit sum kendu hann vistu, hvussu følin og eymur hann í grundini var.

Hann kundi tykjast bráur í sínum atgerðum og kanska úteftir tykjast nakað knortlutur í framferð, tó vit sum kendu hann vistu, hvussu følin og eymur hann í grundini var.

- Minnist einaferð eina



*Tormóður Stórá, lækni, Aksel Johannesen, landsstýrismaður og Eyðun Joensen, sálarfrøðingur*
*Mynd: Jens Kristian Vang*